Høgni og Hergeir:

Samferðslugjald loysnin hjá Strandferðsluni

– Eitt samferðslugjald gevur Strandferðsluni eitt breiðari inntøkugrundarlag, og umframt at tænastustøði hækkar, skapar hetta eisini betri møguleikar hjá útjaðaranum at mennast, halda tjóðveldismenninir Høgni Hoydal og Hergeir Nielsen

SAMFERÐSLUGJALD
Heini í Skorini

Høgni Hoydal og Hergeir Nielsen hava fleiri ferðir havt uppskotið um samferðslugjald á lofti á landsstýrisfundum, men enn er eingin broyting farin fram. Floksformaður og tingmaður Tjóðveldisfloksins hava báðir ta fatan, at eitt fast samferðslugjald loysir fleiri trupulleikar.

Hækkar tænastustøði

– Í einum framkomnum samfelagið sum okkara eigur tænastustøði Strandferðslunnar at vera hægri, har fólk kunnu ferðast nær og hvar, tey vilja, sigur Høgni Hoydal. Hann vísir á, at eitt samferðslugjald kundi verið ein loysn á æviga kjakinum um Strandferðsluna og tænastustøði hennara.

Høgni Hoydal vísir viðari á, at í staðin fyri støðugt at hækka prísirnar á ferðaseðlum og farmaflutningsgjøldum, skuldi samferðslugjald verið innført, so ferðast kann til útoyggjar uttan at gjalda.

– Í staðin fyri kunnu prísirnir hækka á t.d. bensini, olju og vegskatti, og á henda hátt kundu fleiri herðar verið við til at figgja Strandfersøluna, so karmar høvdu verið skaptir til eitt høgt tænastustøði, sigur Høgni Hoydal.

Hann vísir viðari á, at um prísirnir hækka á øðrum økjum, kundi talan verið um gratis ferðir til útoyggjarnar, meðan kostnaðurin til størru plássini eisini hevði lækkað.

– Um samferðslugjald ikki verður innført, er vinnan í útoyggjum ikki kappingarfør við vinnuna í miðstaðarøkinum, og tískil má okkurt gerast, sigur Hergeir Nielsen

Høgni Hoydal ynskir nú at innføra fast samferðslugjald og harvið opna møguleikan at ferðast til útoyggjar uttan at gjalda. – Samstundis kundu prísirnir hækka á øðrum økjum, og á henda hátt høvdu vit hækkað tænastustøði Stranderðslunnar, slær Høgni Hoydal fast

Útjaðarin við sviðusoð

Tingmaður Tjóðveldisfloksins, Hergeir Nielsen, vísir á, at í løtuni eru útreiðslurnar til útjaðaran alt ov høgar.

– Í verandi støðu eru tað borgararnir í útoyggjum, sum í alt ov stóran mun tryggjað Stranderðsluni inntøkurnar, og hetta skaðar kappingarføri í vinnulívinum í útjaðaranum. Í staðin skuldu íbúgvarnir í miðstaðarøkinum eisini luttikið at figgja Strandferðsluna, heldur Hergeir Nielsen.

Hann vísir víðari á, at um vinnan í útoyggjum skal yvirliva, er neyðugt við broytingum.

– Lemmavirkið í Vági er eitt sera gott dømi, tí hjá teimum loysir tað seg betri at flyta vøru til Klaksvíkar umvegis Danmark í staðin fyri beinleiðis norður. Tá er okkurt heilt galið, og tað sigur nakað um, hvussu dýr farmagjøldini eru í løtuni, sigur Hergeir Nielsen avgjørdur.

Partur av økismenning

Umframt at geva Strandferðsluni betri figgjarligar karmar at virka undir og harvið hækka tænastustøði, er talan sostatt eisini um ein økismenningarpolitikk, Hergeir og Høgni eftirlýsa.

– Økismenning hevur verið eitt ævigt kjak, og skulu vit veruliga gera okkurt fyri at betra menningarmøguleikar útjaðarans, má tað síggjast aftur í prísviðurskiftunum, sigur Hergeir Nielsen.

Sostatt sláa teir báðir Høgni Hoydal og Hergeir Nielsen fast, at eitt samferðslugjald hevði loyst fleiri trupulleikar. Umframt at hækka tænastustøði hevði talan sambært teimum verið um eitt framstig í gongdini at føra økismenning út í lívið, og hetta hevði avgjørt verið við til at gera útoyggjavinnuna kappingarføra, vísa teir báðir á.

Bjarni Djurholm um samferðslugjald:

80´ini umaftur!

– At hækka skattin við álegging av samferðslugjaldi er sosialistiskur politikkur, tá hann er villast, og hetta líkist ikki sørt kubanskum framferðarhátti, sigur ein sera avgjørdur Bjarni Djurholm um uppskotið um samferðslugjald

SAMFERÐSLUGJALD
Heini í Skorini

Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri, er sera avgjørdur í aftursvari sínum um samferðslugjald til tjóðveldismenninar Høgna Hoydal og Hergeir Nielsen.

Hann sigur, at Fólkaflokkurin grundleggjandi er ímóti at hækka nakað gjald/skatt, og at hetta ikki fer at henda, meðan hann er landsstýrismaður í vinnumálum.

40 mió. skulu figgjast

Bjarni Djurholm sigur, at ferðainntøkur Strandferðslunnar eru á umleið 40 mió. Um hvør bilur í friari ferðslu skal átaka sær at figgja hesa upphædd, verður talan samanlagt um 5.000 kr.per bil, og tað er burtur úr vón og viti.

– Vit vilja gjarna taka spurningin upp, um møguleiki er at lækka ferðakostnaðin, men so skal sparast innanfyri verandi karmar. At áleggja gjøld í fríu ferðsluni kemur ikki uppá tal, so leingi eg eri vinnumálaráðharri, slær ein avgjørdur Bjarni Djurholm fast.

80´ini øtast

Vinnumálaráðharrin heldur talan vera um eitt vandamikið rák, og líkist hetta ikki sørt skilaleysa framferðarháttinum í 80´unum.

Nógv verður tosað um, at vit ikki mugu gera somu mistøk aftur, men sannleikin er, at uppskotið líkist ikki sørt føroyska 80´arapolitikkinum, sigur Bjarni Djurholm. Hann vísir á, at talan er um reindyrkaða sosialismu, tá ein vil hækka skattin fyri at figgja Strandferðsluna, og at 80´ini høvdu bliknað av hesum hugsanum.

Skipanin til frama fyri øll øki

Víðari vísir leiðari Vinnumálaráðsins á, at verandi skipanin gevur fleiri møguleikar og fyrimunir til útoyggjar.

– Vit hava innført frían post- og pakkaflutning, allar neyðsynjarvørður ferðast frítt til útoyggjarnar, og vinnan í útoyggjum hevur frían flutning til meginøkið, sigur Bjarni Djurholm.

Hann leggur afturat, at Vinnumálaráðið nýtir 5 mió. til flutning við tyrlu um árið, og at talan tískil er um eina skipan, sum leggur lunnar undir kappingarføri og umstøðum á jøvnum føti millum ymsu økini.

Modernisera innanfyri verandi karmar

Bjarni Djurholm leggur dent á, at støðugt og intenst verður roynt at modernisera og dagføra Stranderðsluna og skipan tess, men innanfyri verandi karmar, uttan at talan verður um nakað samferðslugjald.

– Innanfyri verandi figgjarkarmar royna vit støðugt at betra um viðurskiftini, og Strandferðslan hevur fingið 70 mió. játtaðar á verandi figgjarlóg. Uppskot teirra um samferðslugjald er als ikki í tráð við hendan politikk, vit hava sett okkum.

– Ikki meðan eg eri landsstýrismaður

Bjarni Djurholm leggur dent á, at hetta er eitt sosialistiskt uppskot, sum fer út um verandi figgjarkarmar og áleggur hægri skatt og gjald til fólkið, í staðin fyri at halda seg til realistisku figgjarviðurskiftini á verandi øki.

– Um Tjóðveldisflokkurin ynskir at innføra samferðslugjald, mugu teir stinga í sekkin og royna at fáa nýggjan landsstýrismann í vinnumálum, tí hetta verður ikki tikið í nýtslu, so leingi eg eri Vinnumálaráðharri, slær ein avgjørdur Bjarni Djurholm fast.

– Uppskotið um samferðslugjald líkist ikki sørt framferðarháttinum í 80´unum, og er hetta sosialistiskur, kubanskur politikkur, tá hann er uppá tað villasta, sigur ein avgjørdur Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri

Føroyingar drekka føroyskt øl

Vend tykist verða komin í søluna av føroyskum øli sammett við innflutta ølið. Eftir føroyski marknaðarparturin minkaði í 2000 og 2001, so siga tølini fyri 2002, at føroyingar aftur drekka meira av ølinum hjá Føroya Bjór og Restorff. Verri stendur til við sodavatninum, har útlendski innflutningurin hevði metár í fjør

HAGTØL
Páll Holm Johannesen

Í hagtølunum yvir sølu av øli í 2002, kunnu bæði føroysku bryggjaríini, Restorff og Føroya Bjór, fegnast um, at føroyingar aftur eru farnir at drekka meira føroyskt øl. Sammett við árið framanundan er sølan av føroyskum øli økt við trimum prosentum.

Býtið millum føroyskt øl og innflutt øl er 81,7% mótvegis 18,3%, so framvegis eru føroysku framleiðslurnar við greiðan yvirluta yvir innflutta ølinum.

Gongdin er gott tekin til føroysku bryggjarini, tí sambært hagtølunum hjá Rúsdrekkasølu Landsins, so hevur føroyski marknaðarparturin minkað seinnu árini, men nú tykist vend verða komin í.

Framvegis drekka føroyingar væl meira av føroyskum øli enn av innflutta ølinum. Verri stendur til Restorff og Føroya Bjór við sodavatninum, har innflutningurin av útlenskum sodavatni hevði metár í fjør
Mynd: Álvur Haraldsen

Vit drekka eisini størri nøgdir av øli, enn vit áður hava gjørt. Sammett við 2001, drukku føroyingar góðar 50000 litar meira av øli í 2002.

Meira útlendskt sodavatn

Meðan føroysku bryggjaríini kunnu breggja sær av at hava greitt yvirtak á føroyska øl-marknaðinum, so stendur verri til við sodavatninum. Hóast føroysku framleiðslurnar framvegis hava yvirtakið, so hevur útlendska sodavatnið størri marknaðarpart enn nakrantíð.

Tølini fyri 2002 siga, at sølubýtið er 60-40 til føroyskan fyrimun. 60 % av føroyska sodavatnsmarknaðinum er minsti marknaðarparturin hjá føroyska bryggjaríunum nakrantíð

Lýsingar avirka nógv

Heilsølurnar Poul Hansen og Poul Michelsen eru høvuðsumboð fyri innflutta sodavatnið í Føroyum. Mest selda útlendska sodavatnin er Coca Cola, sum Poul Hansen umboðar. Petur Zachariassen er søluleiðari á Poul Hansen, og hann fegnast sjálvsagt um vøksturin av útlendskum sodavatni í Føroyum.

Spurdur, um hvør orsøkin er, at føroyingar drekka meira útlendskt sodavatn, svarar Petur, at hann dugir ikki rættiliga at siga ítøkiligt um orsøkina, men allarhelst ávirka nógvu lýsingarnar. Hann sigur frá, at teir merkja beinanvegin eina størri sølu av útlendska sodavatninum, um onkur nýggj lýsing er frammið í fjølmiðlunum

Sølustjórin fortelur eisini, at longu nú kann Poul Hansen staðfesta, at sølan av sodavatni í ár verður størri enn í fjør. Serliga juli mánaði eydnaðist væl, og talan var um metsølu. Spurningurin er so, um metsølan hjá Poul Hansen fer at ávirka marknaðarbýtið av útlendskum sodavatni í mun til føroyska sodavatnið, tá árið 2003 er lagt aftur um bak.

Rottur taka sær av løttum á Marknagilsvegnum

Grannar við Marknagilsvegin ilskast inn á allar rotturnar, ið halda til har um leiðir. Teir meta, at trupulleikin við rottunum stavar frá umbyggingin av Marknagilsvegnum, tá beint varð fyri fleiri kloakkrørum

ROTTUR
Páll Holm Johannesen

Seinastu tíðina hava fleiri fólk, ið búgva við Marknagilsvegin, givið ilt av sær, tí dagliga fáa tey eyga á rottur, sum halda til har um leiðir. Grannarnir hava gjørt vart við trupulleikan á Tórshavnar Býráð, og hóast fólk hava verið og lagt rottugift, so røkist lítið fyri at trupulleikin við rottunum er loystur, tí tær gerast fleiri og fleiri í tali.

Grannarnir halda, at rottutrupulleikin stavar frá umfatandi vegarbeiðinum, ið varð gjørt á Marknagilsvegnum fyri nøkrum árum síðan. Teir, ið høvdu byggiarbeiðið undir hond, brutu í samband við vegarbeiðið, fleiri rør, ið gingu út til eina av kloakkunum á Marknagilsvegnum.

Ætlanin var so, at nýggj rør skuldu setast í, men fyri nøkur av húsunum eru nýggj rør aldrin lødd í aftur, og sambært tí eina grannanum, so hanga tey rørini framvegis í leysari luft.

Grannin, ið ikki ynskir at verða navngivin, sigur, at fólk við Marknagilsvegin hava mistankað um, at kloakkrørini eru orsøkin til, at rotturnar hava funnið seg so væl til rættis við Marknagilsvegin.

Hann fortelur frá, at grannar hava gjørt vart við trupulleikan í býráðnum, men trupulleikin er framvegis ikki loystur, og núverandi støða er ikki serliga tespilig hjá grannunum at verða í.

Grannar við Marknagilsvegin ilskast inn á allar rotturnar, sum halda til við Marknagilsvegin. Hóast fólk hava lagt rottugift, so røkist einki fyri at trupulleikin er loystur. Tær nørast skjótt, og tað eru longu fleiri í tali

Savnsmynd

Síggjast dagliga

Grannin sigur, at rotturnar nørast skjótt, og seinastu tíðina eru tær blivnar fleiri í tali.

– Vit síggja til rotturnar dagliga, og vanliga eru tær at síggja í túninum ella í urtagarðinum millum rabarburnar, greiðir grannin frá.

Hann hevur sjálvur roynt at leggja rottugift, men lítið hjálpir. Grannin sigur skemtandi, at rotturnar eru ov klókar til at lata seg lumpa av rottugiftinum.

Hann fortelur frá, at hann hevði lagt rottugift ímillum rabarburnar, men rotturnar hava ikki gjørt mætari enn at flyta pakkan við rottugifti, so tær sleppa at grava í fri. Grannin sigur brosandi, at tað má verða tí, at rotturnar kunnu lesa á pakkanum at rottugift er sera vandamikið.

Rottufangari sigur seg einki vita

Rottufangarin hjá Tórshavnar Býráð sigur seg einki vita um støðuna á Marknagilsvegnum. Hann sigur, at hann á staðnum fyri góðum tveimum mánaðum síðan, men síðan hevur einki hoyrt til at støðuna. Hann legði rottugift, og eftir, hvat hann hevur frætt, so varð trupulleikin loystur, tí hann hevur ikki hoyrt frá grannunum síðan.

Hann fortelur annars, at tað ikki eru stórir trupulleikarnir við rottum í høvuðsstaðnum, og at teir hava tamarhald á støðuni. Rottugift er ein sera effektivt loysn, og giftin hevur tálmað nøringini av rottum í Havn.